# Stýrisfundarbók FKF

## 14-12-2010 / 14

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10:30

*Fundur lokin kl:* 12:40

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Erik Davidsen | |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | Avboð |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

---

**Fundarmál nr: 68**

FKF Jour. nr: 09-125

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Dagstovnar, námsfrøðiligt stevnumið

Málslýsing: Í telduposti 7. desembur, bjóðar Mentamálaráðið felagnum at viðmerkja uppskot til námsfrøðiligt stevnumið fyri dagstovnar. Sí skjal 68.

Námsfrøðiligu stevnumiðini taka støði í endamálsgreinini í Løgtingslóg nr. 67 frá 10 mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt. Hetta eru fyrstu stevnumið av sínum slag fyri dagstovnar í Føroyum. Stevnumiðini stinga virðisgrundarlagið út í kortið, sum dagstovnarnir skulu byggja sítt virksemi á, og skulu verða grundarlagið undir ársætlanunum hjá dagstovnunum. Harumframt eru stevnumiðini vegleiðandi fyri dagrøktarskipanir.

Uppskotið er sent øllum dagstovnunum; FKF og KSF. Freist fyri viðmerkingum er 1. februar 2011.

Tilmæli:
Stýrisbólkarnir Mentan & Skúli og Fíggjar- & Kommunumál gegnumganga uppskotið við atliti til
- kommunupolitik á økinum,
- fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum.

Málið verður sett til viðgerðar á borgarstjórafundi í januar 2011. Á sama fundi verður kannað um áhugi er fyri at gera uppskot um stevnumið kommunanna á ansingar- og skúlaøkinum.

Fundarsamtykt: Kanna í hvørjum sambandi arbeiðið er gjørt, við atliti til, at ein arbeiðsbólkur er settur at endurskoða dagstovnalógina.

Uppskotið fer at kosta kommununum dýrt í arbeiðstímum hjá pedagogunum v.m.

Kanna um kommunurnar hava stevnumið fyri økið.

*Støða: Í bíðistøðu.*

---

**Fundarmál nr: 69**

FKF Jour. nr: 09-124

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Forskúlar, skipan og undirvísing

Málslýsing: Mentamálaráðið hevur sent felagnum uppskot til kunngerð um skipan og undirvísing í forskúla til hoyringar. Sí skjal 69.

Sambært uppskotinum kunnu kommunurnar eftir umsókn fáa heimild at seta forskúlaflokkar á stovn. Kommunan ber allar útreiðslur av forskúlanum á staðnum. Forskúlafolkkur skal hava atknýti til ein fólkaskúla. Skipað samstarv skal verða ímillum lærarar og pedagogar í forskúlanum, byrjunarundirvísing og frítíðarskúla. Skúlaleiðarin hevur dagliga ábyrgdina av forskúlanum og setir og loysir fólk úr starvi.

Tilmæli:
Við støði í uppskotinum er forskúlin ein rættuliga integreraður partur av fólkaskúlanum og undir leiðslu skúlaleiðarans. Uppskotið leggur eisini upp til at hettar er eitt skúlatilboð. Í dag eigur landið umsitingina og fíggingina av sjálvari undirvísingini.

Spurningurin er tí, um kommunan eigur at gjalda fyri lærararnar? Hesir eru settir, løntir og undir leiðslu av MMR.

Samsvar eigur í hvussu er at verða ímillum vald og gjald. Skal kommunan gjalda, og sostatt yvirtaka forskúlan, eiga leiðari, lærarar og pedagogar at verða settir av kommununi. Leiðarin hevur pedagogisku leiðsluna og kommunan umsitingarligu leiðsluna.

Fundarsamtykt: Uppskotið gongur ov langt inn á kommunala sjálvræðið. Sama starvsfólkið kann hava 2 arbeiðsgevarar.

Greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti er neyðugt. Gjald og vald skal fylgja.

Kommunal samstørv neyðug fyri at røkka øllum børnunum, tí fleiri av limunum kunnu ikki hava forskúla vegna treytina um, at tað skulu vera 12 næmingar í klassanum.

*Støða: Avgreitt við svarskrivi 09-124_1.3 til MMR, dagd. 17. des.*

---

**Fundarmál nr: 70**

FKF Jour. nr: 09-123

Reist av: Formanninum

Fundarmál: Valskipan til stýri FKF

Málslýsing: Tikið upp frá fundi 12 har samtykt var, at taka valskipanina upp á komandi umboðsráðsfundi. Tað er ein trupuleiki, at Vágarnar ikki hava valdan eykalim í stýrinum. Sí skjal 70.

Tilmæli:
Í § 11 í felagslógini verður nýtt 5. petti sett inn. Í økjum har talið av

umboðsráðslimum er minni enn talið av limum og eykalimum, sum skulu veljast í stýrið, støðan í Vága- og Streymoy/Sundaøkjunum í dag, verður hereftir møguleiki at velja varalimir í umboðsráðnum sum eykalimir í stýrið.

Fundarsamtykt: Tillaga uppskotsbroytingina til møguleikan at sama kommuna hevur meira enn ein stýrislim.

Freist fyri lógarbroytingum er 6. januar. Alternativt at taka málið til umrøðu á komandi umboðsráðsfundi.

*Støða: Í bíðistøðu.*

---

**Fundarmál nr: 71**

FKF Jour. nr: 09-127

Reist av: Skrivstovuni

Fundarmál: Agenda 21 fíggjarætlan 2011

Málslýsing: Uppskot til fíggjarætlan verður lagt á fkf.fo mánadagin 13. des.

Í virkisætlanini fyri 2011 eru hesir punktar:
- Undirvísingartilfar, roknað við 2-3 mán til arbeiðið sum er deilt í 3 stigum.
- Umhvørvisætlanirnar í eini kommunu, nágreiniliggegnumgongd sum tekur 2-3 mán.
- Suðuroyggin; orkuætlan, 3-4 mán.
- smærri ætlanir; byggitilfar og tøkniligar loysnir, vørunýtsla, almennar framløgur 1 mán.
- hoyringsskriv
- ókend arbeiði, sum áheitanir frá kommununum.

Framtíðarmál: byggillóggávan.

Fundarsamtykt: Fíggjarætlanin góðkend.

*Støða: Avgreitt.*

---

**Fundarmál nr: 72**

FKF Jour. nr: 09-104

Reist av: Skrivstovuni

Fundarmál: Fíggjarætlan FKF 2011

Málslýsing: Broytingar í fíggjarætlanini í samsvar við fíggjarætlanina hjá Agenda 21 stovuni.

Fundarsamtykt: Ongar viðmerkingar.

*Støða: Avgreitt.*